# Meldurstormurin Katrina fekk drepandi fylgjur

**Eg var so optimistiskur í seinastu viku at skriva, at avleiðingarnar av meldurstorminum Katrina skjótt mundu javna seg, og oljuprísurin falla til eitt lægri støði aftur. Hetta var eitt mistak**

MELDURSTORMUR, OLJUPRÍSIR OG GEOPOLITIKKUR

*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Áðrenn eg var kunnugur við alt hetta, sum er komið fram seinastu vikuna um støðuna og hendingarnar í býnum New Orleans, og statunum Louisiana og Missisippi, var eg kanska naivur, og trúði at heimsins ríkasta land, einasta stórveldi í heiminum, supermaktin USA, hevði tjekk uppá nakað so rættiliga banalt at byggja og viðlíkahalda byrgingar fram við láglendunum og fram við stóru áunum. Hetta var eisini eitt mistak.

Vóru teir ikki nóg væl fyrireikaðir í hesum landsparti í USA

- har meldurstormar ella hurricanes koma 10-20 ferðir á hvørjum ári;
- har veðurmenninir vita hvussu sterk vindmegin er í eini category 5 hurricane;
- har myndugleikarnir vita hvussu høg flóðin og aldurnar verða, tá ein meldurstormur av hesi styrki rakar landið;
- har ein hálv millión av fólki skal evakuerast, tá ein slík ódn nærkast;

Tað fer at taka ár, áðrenn avleiðingarnar av hesi katastrofu javna seg aftur, og spurningurin er um verðin nakrantíð verður tann sama aftur?

## Amerikansk sjónarmið

Í amerikanska blaðnum New York Times hevur høvundurin Maureen Dowd (3.9.05) nakrar drepandi viðmerkingar evnaloysi og arrogansuna hjá stjórnini. Greinina kallar hon "United States of Shame". Kalt og kyniskt skrivar hon: ***"Ting henda, og tá tú leggur eina avmarkaða stjórn og eina inkompetenta stjórn saman, so henda deyðilig ting."***

Hon heldur fram við bitrum orðum: ***"Enn einaferð er Amerika dottið í runudíki við anarki, deyða, ræning, neyðtøkum, stuldri, óskyldugum sum líða, elendigum infrastruktur, ódugnaligum politii, ónøktandi herliði, og eina almenna planlegging, sum er kriminelt gáloysin."***

Tá George W. Bush endiliga vaknaði og fór at skoða skaðan, segði hann, meðan hann hugdi út yvir Mississippi-ánna: **"Eg trúgvi ikki, at nakar kundi vita, at byrgingarnar fram við ánni kundu skolast burtur".** Hetta er sum altíð, sigur Maureen Dowd, ein bílig umbering hjá Bush. **"Who could have known?"**

## Støðan á oljumarknaðinum

Oljuprísurin liggur framvegis uppi á umleið 68-70 dollar fyri tunnuna. Framleiðslan í Mexicanska Gulfinum er ikki komin fyri seg enn. Men heldur eru tað trupulleikar á raffinerings-virkjunum, har ráoljan verður til benzin, petroleum og aðrar úrdráttir, sum gera, at eitt nú benzin-prísurin hækkar um alla verð.

Fleiri stór raffineringsvirkir, sum liggja tætt í statinum Louisiana frá Baton Rouge til New Orleans, hava fingið stormog vatnskaðar og liggja still (Hetta økið kallast millum íbúgvarnar "the cancer route," tí tað er so ovur dálkað). Framleiðslan av raffineraðum vørum er í hesum døgum nógv minni enn vanligt, hon liggur faktisk á botni.

Internationali stovnurin IEA, International Energy Agency, í París tosar um globala orku-kreppu. Argumentini eru, at um amerikansku raffineringsvirkini hava fingið stórar skaðar av meldurstorminum Katrinu, so fer US at keypa benzin í Europa, og prísurin fer at hækka um allan heim. Í USA er prísurin á gasoline (benzin) uppá eina viku farin upp við 20 procentum.

Henda príshækkan kann gerast ein hóttan móti heimsbúskapinum. Vøksturin kann steðga upp, og kreppan breiða seg.

## Langtíðarútlitið ella geo-politisku avleiðingarnar

Supermaktin USA ger alt fyri at tryggja sær atgongd til olju. Uttan olju, eingin framleiðsla, eingin bilkoyring, einki hervald. Men USA, sum fyrr var stórframleiðari av olju, noyðist í dag at flyta inn megin-partin av hesi rávøru.

Sum <u>mynd 1</u> vísir (keldur til mynd 1-3, Opec statistikkur), so er Norðuramerika tann heimspartur-in, sum brúkar mesta olju, og verður tað roknað um til býtslu uppá íbúgvan, so liggur USA klárt á odda. Myndin vísir eisini hvussu gongdin hevur verið seinastu 20 árini, millum 1983 og 2003, sum eru nýggjastu tøl frá Opec. Nýtslan er vaksandi allastaðni uttan í Eystureuropa, og orsøkin er afturgongd og fallandi framleiðsla eftir at kommunistisku stýrini vóru sett frá.

Men seta vit so spurningin, hvar verður oljan framleidd, so fáa vit eina aðra <u>mynd (2)</u>. Har er Miðeystur klárt tann størsti framleiðarin, við Saudi Arabia á odda. Stórframleiðarar eru harumframt Iran, Irak og Kuwait. Men,







